## Flýggjar undan veruleikanum

Line brúkar sína frítíð til ymiskt.

- Mær dámar væl at gera mat. Vit tosa eisini ofta um mat og býta uppskriftir millum okkum.

- Annars spæli eg klaver, og mær dámar eisini væl at lesa. Mær dámar væl at flyggja undan veruleikanum og inn í eina bók av og á, sigur Line, sum væl klárar at tosa hebraiskt.

- Tað kann vera trongt í kollektivinum, sum vit búgva á, og tá er gott at seta seg við einari bók og gloyma umheimin, sigur Line.



# enn heimlongsulin



*- Vit vita ikki, hvussu leingi vit skulu vera í Ísrael. Vit trívast ordiliga væl her, men júst nú búgva vit í einum kollektivi, so tað er ikki haldbært fyri okkum í longdini. Men um vit kunnu finna onkran annan bústað í Ísrael, so kunnu vit steðga her leingi, sigur Line*

fær eisini møguleika at síggja lítla Jónathan, sigur Line.

Tey leingjast ikki illa heim, og tí er tað eisini gjørligt hjá teimum at búgva so langt burturi frá øllum heima.

- Vit trívast væl í Ísrael.

Tikva tosar flótandi danskt og hebraiskt. Eg royni at halda tað føroyska viðlíka, og hon verður eisini avbjóðað í fronskum og enskum. Hon trívist væl, og vit trívast eisini væl.

- Eg havi ongantíð havt heimlongsul. Útilongsulin hevur í øllum førum altíð verið størri enn heimlongsulin, sigur Oddmar.

### Hjálpa veikum

Arbeiðið, sum Oddmar og Line standa í, inniber at hjálpa teimum veikastu í samfelagnum. Tey fara út til fólk og gera teirra íbúðir í stand.

Line arbeiðir í einum suppukøki, har ið fólk fáa máltíðir.

Fólk eru glað um arbeiðið, sum Ordet & Israel ger.

- Vit vilja vísa Ísraelsfólki á Guds frelsuætlan við teimum. Hetta gera vit við at hjálpa teimum og vitna, tá ið vit fáa møguleikan.

- Vit hava júst gjørt íbúð nummar 100 í stand. Vit fáa ein lista frá sosialu kontórunum yvir fólk, sum tørva okkara hjálp. Okkara hjálp er ikki ein almenn veiting, men sjálvboðið vælgerandi arbeiði, sigur Oddmar.

- Av og á fáa vit takkarbrøv frá fólki, sum hava móttikið okkara hjálp, sigur Line.

Tey halda, at fjølmiðlarnir í vesturheiminum bera mangan eina einsíðuga mynd av Ísrael, sum ikki samsvarar við veruleikan.

- Ísrael er nógv meira enn tað, sum kemur fram í fjølmiðlunum. Konfliktin millum Ísrael og Palestina fær stóran ans í fjølmiðlunum, men hon fyllir ikki so nógv í gerandisdegnum hjá okkum. Tað merkist tó at trygdin er sera høg, og tað eru vaktir í mest sum hvørjum bussi.

- Fólk hoyra einki um tær positivu søgurnar. Tað verður gjørt eitt stórt arbeiði at forsóna fólkabólkarnar. Millum annað hava tey fyri stuttum havt eina ítróttarstevnu, sum hevði til endamál at samnsjóða fólkabólkarnar. Tað verður mett at vera ein sólskinssøga í Ísrael, sigur Oddmar.

### Eitt ár í senn

Oddmar og Line hava sáttmála við Ordet & Israel inntil januar 2008. Tey hava møguleika at forleingja hann eitt ár í senn.

- Vit vita ikki, hvussu leingi vit skulu vera í Ísrael. Vit trívast ordiliga væl her, men júst nú búgva vit í einum kollektivi, so tað er ikki haldbært fyri okkum í longdini. Men um vit kunnu finna onkran annan bústað í Ísrael, so kunnu vit steðga her leingi, sigur Line.

- Tikva er vorðin 3 ár, og hon skal í skúla einaferð. Tað hugsa vit eisini nógv um. So mugu vit taka støðu til, um hon skal ganga í skúla her, ella um vit skulu fara heim til Danmarkar tá, sigur Oddmar.

- Vit hugsa realistiskt, og um okkara ynskir og ynskini hjá Ordet & Israel ikki passa saman, so fara vit víðari. Vit taka eitt ár í senn, sigur Oddmar.

## Átrúnaður og politikkur flættað saman

Í Ísrael er tætt samband millum religiøsu og politisku leiðararnar. Har eru eisini jødiskir politiskir flokkar.

- Ein flokkur, sum kallast Shas, hevur ein politiskan og andaligan leiðara. Teir hava religiøs viðurskifti á dagskránni, sigur Line.

- Hesir flokkarnir hava stóra ávirkan á Ísraelskan politikk. Fleiri av teimum ungu jødunum er sera sekulariseraðir og kunnu einans kallast fyri mentanarjødar. Tí er tað týdningarmikið fyri politikarnar at varðveita eina religiøsa kjarnu, sum myndar tann jødiska samleikan hjá Ísrael. Hesir trúarbólkar fáa tí nógvan stuðul og nógvar pengar frá politiska valdinum, sigur Line.